## Ferðsluóhapp á Sundi

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnukvøldið um átta tíðina var eitt ferðsluóhapp á Sundi. Ein bilur við fýra fólkum fór útav vegnum, vegna hálku.

Á politistøðini upplýsa tey, at onkur av teimum ferðandi fór á skaðastovuna, tí viðkomandi hevði fingið heilaskjálvta. Bilurin hevði fingið stóran materiellan skaða.

## Genta ákoyrd

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Um hálvgum átta tíðina leygarkvøldið var eitt óhapp við frákoyringina Nesvík-Langasandur. Ein 13 ára gomul genta varð ákoyrd, og hon breyt beinið. Hon varð flutt á sjúkrahúsið, har hon liggur enn.

Annars verður upplýst av politistøðini í Havn, at ógvuliga friðarligt hevur verið um vikuskiftið. Ongin liggjandi gestur hevur verið, og hetta kann kanska tykjast óvanligt, tí sum oftast er onkur, sum svevur í brummuni.

## Kvívíkingar fingið nýggjan sløkkiliðsbil

**Nú kunnu kvívíkingar gleðast um nýggja sløkkiliðsbilin, sum júst er komin til landið**

AKFØR
*Ingrid Bjarnastein*

Kvívík hevur ongan sløkkiliðsbil havt í hálvt annað ár. Men nú er ein spildurnýggjur bilur komin til bygdina, sum skal brúkast til at sløkkja eldar í kommununi.

– Hetta er ein sløkkiliðsbilur, sum vit hava bílagt í sambandi við eldsløkking í kommununi, og nú tunnilin einaferð fer at koma, sigur Heini Holm, borgarstjóri í Kvívík.

Í hálvt annað ár hevur bygdin ongan sløkkiliðsbil havt, og áðrenn tað var eitt ellisakfar, sum var 33 ára gamalt. Tað varð selt til ein savnara.

Hesin nýggi bilurin tekur 2000 litrar av vatni, og væntar borgarstjórin, at nú fer at bera til at nøkta tørvin í kommununi.

Reyði sløkkiliðsbilurin kostaði um 1,3 milliónir krónir, upplýsir Heini Holm, og hetta verður fíggjað ígjøgnum rakst-urin.



*Kvívíkingar kunnu nú verða tryggir, tí nýggjur sløkkiliðsbilur er júst komin til bygdina. Bilurin tekur heilar 2000 litrar av vatni*

# Mjólkarvirkið hátíðarhelt stovningardagin

**Fríggjadagin var móttøka uppi á Mjólkarvirkinum í sambandi við, at 25 ár eru liðin síðani felagið varð sett á stovn**

FØÐINGARDAGUR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Fyri 25 árum síðani varð lutafelagið Meginfelag Búnaðarmanna, fyrst kallað Mjólkarvirkið Búnaðarmanna, sett á stovn.

Hátíðarhildið varð fríggjadagin í sambandi við sjálvan stovningardagin, hóast sjálvt Mjólkarvirkið ikki byrjaði fyrr enn tann 1. apríl 1980.

Heilt fitt av fólki hevði leitað sær niðan á Mjólkarvirkið fyri at hátíðarhalda dagin saman við stjórum og starvsfólkum.

Veitsla var annars í Hósvík leygardagin fyri starvsfólki og bóndum.




*Rólvur Djurhuus, nevndarformaður, og Eirikur Thorvaldsson, stjóri*



*Linda Gunnlaugsdóttir, Eimskip, Eirikur Thorvaldsson, Jørn Astrup Hansen og Dánjal Pauli Danielsen, fyrrverandi landsstýrismaður í búnaðarmálum*





*Nakrir av úrdráttunum hjá Mjólkarvirkinum*



# Fjallafípan fjálg og heimlig

**Leygardagin var móttøka í útibarnagarðinum, Fjallafípuni í Klaksvík, í sambandi við, at stovnurin alment varð tikin í nýtslu. Fyrstu børnini byrjaðu í barnagarðinum fyri góðum mánaða síðan. Í røðu sínari, frøddist Jóhanna West, leiðari, um góðu umstøðurnar og umhvørvið, ið barnagarðurin hevur at virka undir**

BØRN OG ANSING
*Orð og myndir*
*Rúna Sivertsen*

Dagurin í dag er ein stór løta hjá okkum øllum, ið hava staðið á bíðilista í langa tíð, segði Eyðgunn Samuelsen, formaður í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar Býráð, tá hon helt røðu við móttøkuna í Fjallafípuni leygardagin.

Við hesum vísti hon á, at ikki bara børn og foreldur hava bíðað, men sanniliga eisini tey, ið stríðst hava fyri at útvega fleiri ansingarpláss í kommununi.

Á hugnaligu samkomuni, har eisini høvi var at fáa sær ábit, vórðu fleiri røður hildnar.

Fyrstur var Finn Johannesen, formaður í nevndini fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum. Hann handaði borgarstjóranum, Steinbjørn Jacobsen, lyklarnar til húsið og ynskti hjartaliga tillukku við útibarnagarðinum.

Tað er ferðavinnan í Norðoyggjum, sum eigur húsið, har nú 40 børn hava fingið ansingarpláss.

Børnini dýrasta ogn

Børnini eru okkara dýrasta ogn, segði borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen. Tey eru framtíðin; tí er umráðandi, at vit fara væl um tey og geva teimum tað besta.

Og ikki kann sigast annað enn, at Fjallafípan er eitt gott stað hjá børnum at vera.

Rúmini eru heimlig og fjálg. Uttandura, beint fyri fótunum, liggur Guds órørda náttúra, besta spælipláss børn kunnu hugsa sær.

Men enn er bíðilistin eftir barnaansingarplássum hjá Klaksvíkar Kommunu ikki komin til lívs. Fyri at minka um tørvin við 20 børnum aftrat, er ætlanin at byggja suðurúr bygninginum undir Hamarsenda, har Fjallafípan búleikast.

Í løtuni eru 70 børn á bíðilista; tað er ein stór minking síðan ár 2000, tá bíðilistin lá omanfyri 200.



*Børnini hugnaðu sær óført við móttøkuna leygardagin. Og hugflogið setur eingi mørk. Sauna, sum stendur tómt til summargestirnir koma, kann saktans nýtast til eina »útflugt« sum hesa. Trivnaðurin hjá børnunum er ikki tengdur at prýðiligum bygningum, men fyrst og fremst av menniskjaligu virðunum, segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í sínari røðu*



*Jóhanna West, leiðari á Fjallafípuni (í miðjuni) í práti við Christian Olsen, stjóra á Norðoya Kunningarstovu og Henrikku Nielsen, ið eigur 2 av børnunum, sum nú hava fingið ansingarpláss í nýggja útibarnagarðinum, Fjallafípuni undir Hamarsenda í Klaksvík. Um 100 fólk, børn og vaksin, stukku inn á góvið til móttøkuna seinnapartin leygardagin*



*Finn Johannesen, formaður fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum. Tað er felagið, Ferðavinnan í Norðoggjum, ið eigur bygningin, sum kommunan leigar til útibarnagarð. Ætlanin er, at frítíðarhúsini, sum hava staðið ónýtt síðani 1995, verða nýtt til ferðafólk 2 mánaðir um árið, segði Finn m.a. í røðu síni*